# Skatta- og avgjaldsmál avgerðir

| Mál nr.: 09-02-22-71 | Lóg: Lóg um Toll- og Skattafyrisiting § 24 | Avgerð tikin: 07.09.2009 |
|---|---|---|

## Kærufreist

**Samandráttur:**

**Skatta- og avgjaldskærunevndin avgjørdi, at kærufreistin skal roknast frá tí, at kæruumboðið fekk boð um avgerðina, og at kæran tí er send rættstundis sambært § 24, stk. 2 í løgtingslóg nr. 169 frá 30. desember 1997 um toll- og skattafyrisiting.**

### Avgerð

**Kært er um,** at TAKS hevur broytt kapitalvinningssjálvuppgávu hjá kærara fyri 2007.

Avgerðin hjá TAKS er dagfest 25. mars 2009. Kæran er dagfest 20. juli 2009 og var Kærustovninum í hendi tann 24. juli 2009.

Tað framgongur av upplýsingunum í málinum, at TAKS hevur sent ætlanarskriv í málinum tann 14. januar 2009. Kæruumboðið sendir viðmerkingar viðvíkjandi ætlanarskrivinum til TAKS tann 3. februar 2009. Tann 26. juni 2009 vendir kærarin sær til TAKS um, at eingin avgerð er tikin í málinum, og TAKS sendir kæraranum avrit av broytingarskrivinum. TAKS sendir kæruumboðnum avrit av broytingarskrivinum tann 6. juli 2009. Kærustovnurin móttekur kæru í málinum tann 24. juli 2009, sum er dagfest 20. juli 2009.

**Kæruumboðið** upplýsir í kærunu, at kærarin ikki hevur móttikið broytingarskrivið frá TAKS, sum TAKS sendi 25. mars 2009.

Viðlagt er skriv frá TAKS til kæraran dagfest 26. juni 2009, sum er soljóðandi: ”Viðv. broytingarskrivi (kapitalviningssjálvuppgáva 2007). Tygum hava í dag pr. telefon vent tygum til TAKS um, at eingin avgerð er tikin í málinum. Sum avtalað pr. telefon í dag er hjálagt avrit av broytingarskrivi, ið TAKS hevur sent tygum. Broytingarskrivið er dagfest 25. mars 2009.”

### Avgerðin hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini

Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur tikið støðu til, um kæran er send rættstundis sambært § 24, stk. 2 í løgtingslóg nr. 169 frá 30. desember 1997 um toll- og skattafyrisiting.

Sambært § 24, stk. 2, síðsta pkt. í lóg um Toll- og skattafyrisiting, skal kæra vera send, áðrenn 4 vikur eru lidnar frá tí, at kærandi fekk boð um avgerðina.

Útgangsstøðið er, at um ein partur er umboðaður av einum øðrum, skal avgerðin í málinum fráboðast til kæruumboðið. Kærufreistin verður roknað frá tí, at kæruumboðið fekk boð um avgerðina.

Tað framgongur av skrivi dagfest 3. februar 2009 frá kæruumboðnum til TAKS, at kærarin hevur vent sær til umboðið viðvíkjandi málinum (ætlanarskrivinum frá TAKS), og at

umboðið tí ger viðmerkingar til ætlanarskrivið frá TAKS, dagfest 14. januar 2009. Á hesum grundarlagi má umboðið metast at vera kæruumboð í málinum.

Tað framgongur í skrivi dagfest 6. juli 2009 til kæruumboðið, at TAKS hevur sent broytinagarskriv til kæraran tann 25. mars 2009. Hetta má skiljast soleiðis, at broytingarskrivið bert er sent til kæraran og ikki til kæruumboðið.

Kæruumboðið móttekur avgerðina við skrivi frá TAKS, dagfest 6. juli 2009. Kærufreistin skal tí roknast frá 9. juli 2009. Kæran er dagfest 20. juli 2009 og móttikin av Kærustovninum 24. juli 2009, og kæran er uttan iva send rættstundis.

**Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur avgjørt, at kærufreistin skal roknast frá tí, at kæruumboðið fekk boð um avgerðina, og at kæran tí er send rættstundis.**